Tórshavn, tann 17. november 2020

Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 15
100 Tórshavn

Viðv. heimild til at flyta ófiskaða makrelkvotu frá 2020 til 2021

Fiskimálaráðið hevur sent uppskot til broytingar í Sjófeingislógini til ummælis.

Felagið Nótaskip loyvir sær vinarliga hervið at venda sær til Fiskimálaráðið við áheitan um, at uppskotið verður broytt soleiðis, at trygd er fyri, at øll ófiskað makrelkvota í 2020 kann flytast til 2021.

Sambært uppgerð hjá Vørn eru 22.600 tons eftir at fiska av makrelkvotuni hjá skipabólkunum, ískoytiskvotunum og uppboðssølukvotunum.

Sambært grein 34, stk. 4 í Sjófeingislógini kann landsstýrismaðurin loyva at upp til 10% av egnari árskvotu hjá ávisa fiskifarinum kunnu flytast til árið eftir. Við hesi heimild kann bert ein avmarkaður partur av teimum 22.600 tonsunum flytast til næsta ár.

Tí er neyðugt, at landsstýrismaðurin hevur serstaka heimild í Sjófeingislógini, sum kann tryggja, at virðið á ófiskaðu makrelkvotuni í 2020 kemur til høldar.

Í grein 34, stk. 4 í Sjófeingislógini kann landssstýrismaðurin í serligum førum loyva, at meira enn 10% av egnari árskvotu kunnu flytast millum ár. Av tí, at ivi kann verða um henda heimild eisini fevnir um ófiskaða kvotu, mælir Felagið Nótaskip til, at beinleiðis heimild verður givin í Sjófeingislógini til at flyta alla ófiskaðu makrelkvotuna í 2020 til 2021.

Vinarliga
Jógvan Jespersen
stjóri

Felagið Nótaskip
Faroese Pelagic Organization
Óðinshædd 7
P.O.Box 1038
110 Tíórshavn
Faroe Islands
Phone + 298 739910
E-mail: notaskip@notaskip.fo
www.notaskip..fo